

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 06 - 2012

# Hugaligt tá Føroyar gerast útgerðarstøð

Seinastu dagarnar hevur norska seismikkskipið Nordic Explorer ligið á Havnini, har tað ger klárt til eina stóra og spennandi verkætlan á leiðunum við Jan Mayen. Tað er norski staturin, sum stendur fyri verkætlanini, ið varir í tríggjar mánaðir. Avgjørt er at brúka Føroyar sum útgerðarstøð undir verkætlanini. Í hesum sambandi er nógv vøra komin til Føroya og er hon uppskipað á PGS seismikkskipið, áðrenn tað setir kós móti Jan Mayen. Skipið ger eisini brúk av føroyskum vørum og tænastum. Thor í Hósvík er umboð hjá PGS. Ein teirra, sum legði leiðina oman á Vestaru Bryggju í Havn hósdagin at síggja nýggja og áhugaverda virksemið har var stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen. Hann sigur, at tað var vóru sera hugaligt tíðindi, sum oljan.fo hevði at bera mikudagin um PGS-skipið, sum nú brúkar Føroyar sum útgerðarstøð. Tað er hugaligt og at fegnast um, at slíkt virksemi tekur seg upp við tilknýti til Føroyar. Hetta ger eisini, at føroysk vinna kemur meira uppí virksemið, sum er uttanfyri landoyddarnar, og tað er gagnligt fyri føroyska búskapin. Myndir - Nógv vøra er komin til landið, nú norska seismikkskipið Nordic Explorer ger klárt at fara til Jan Mayen. Eisini føroyskar fyritøkur lata vørur og tænastur. Myndatøka - oljan.fo/Jan Müller